

www.oljan.fo

**Jan Müller** 10 - 11 - 2012

# Sjónám eitt gullnám fyri Føroyar

Leygardagin læt nýggi stovnurin Sjónám dyrnar upp fyri almenninginum. Fólk úr vinnuni og umboðandi myndugleikar og stovnar kring landið brúktu høvi at síggja henda nýggja og prýðiliga bygning, sum fer at vera partur av grundarlagnum at menna fólkið í vinnuni og harvið eisini vinnulívið í Føroyum. Ein teirra, sum varð hjástaddur og var errin av nýggju kørmunum hjá trygdarmiðstøðini og sjómansskúlanum, var landsstýrismaðurin í mentamálum, Bjørn Kalsø. Hetta hevur verið ein tungur burður, tí tað er langt síðani, at man fór at tosa um at útvega betri høli til trygdarmiðstøðina, og nú hevur man so eisini fingið tann partin av sjómansskúlanum, sum er í Klaksvík, við. Hetta sær gott út. Fysisku karmarnir eru sera góðir, og eg síggi fram til, at hetta fer at verða heilt gott bæði í sambandi við fiskivinnuna og frálandavinnuna, sum er í stórari menning. Eg dugi eisini at síggja fyri mær, at aðrar vinnur, eitt nú alivinnan, kunnu fáa lut í hesum framburði. Eg síggi fram til, at Sjónám í Klaksvík fer at verða nógv brúkt í framtíðini, og at vit øll við hesum góðu karmum kunnu skapa menning og framburð í Føroyum. Bjørn Kalsø heldur seg ikki taka munnin ov fullan, tá hann sigur, at Sjónam er eitt sætt gullnám fyri Føroyar. Mynd - Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í mentamálum fegnast um nýggja Sjónám. Mynd oljan.fo/Jan Müller NB - Sí eisini stóra og fjølbroytta myndafrásøgn frá stóra degnum í gjár, tá latið varð upp fyri Sjónámi.